


***Nr. 1*** ***6. januar 2013*** ***73. árg.***

# So fór..... so fer

So fór aftur eitt ár í tíðarinnar hav. Árið 2012 við øllum teimum møguleikum, tað bar í sær, er farið. Møguleikum, sum vit gjørdu brúk av, og møguleikum, sum vit lorkaðu burtur.

Onki fáa vit broytt av tí, sum farið er. Hitt farna árið eiga vit bara í minnunum – ljós og døpur minnir.

Munnu ikki mong okkara mega taka undir við Svend Rehling, tá ið hann syngur:

*Jesus, eg nígi fyri tær,*
*biði í iðran her:*
*skjøldur og svørð tú fái mær,*
*royn meg enn einaferð!*

Og standa vit soleiðis, so latið okkum leggja oyrað til, hvat ið orð Harrans svarar okkum: sum eystrið er fjarlagt frá vestri, so hevur hann firrað misgerðir várar frá okkum. (Sálmur 103, 12).

So fer várt fet um nýggjársgátt. Ikki bert er eitt ár farið, men eitt nýtt stendur framman fyri okkum við øllum teimum ríku møguleikunum, sum Gud í náði síni unnar okkum at fáa burtur úr teimum gávum, sum hann gevur okkum. Og av Guds mongu gávum er tíðin ein hin týdningarmesta.

Men hvørjum fylla vit so tíðina við? Skal tíðin, sum nú liggur fyri framman, fyllast við tí, sum Gud ikki kann kennast við? Ja, men so er hon burturspilt! Ella skal hon fyllast við øllum tí, sum Gud við gleði vil leggja sína signing í?

Gera vit tað, at vit liva lívið saman við Gudi, so koma vit at uppliva, hvussu ríkt tað er, um enn vit mangan stíga rangt. Ja, men, sigur tú, at

standa við byrjanina av einum nýggjum ár, er at stara inn í eina ótrygga, ókenda framtíð. Eg eri bangin, sigur tú. Rætt er tað, vit eru bangin, men latið okkum so hoyra faðirin á himli siga við barn sítt: ”Eg vil teg læra og vísa tær vegin, tú skalt ganga, eg vil hava eyguni eftir tær.” (Sálmur 32,8). - Tí fara vit inn í tað nýggja árið við góðum treysti.

# Gakk djarvur inn í nýggja árið

*”Verið reystir og hugdjarvir og óttist ikki ...” 5. Mós. 31,6.*

Um vit ikki eru djørv, liva vit ikki, vit fjala okkum! Tað er dirvi, sum flytur okkum frameftir; tað er tann megin, sum fær trúgv tína at virka. Trúgvin einsamøll er bara ein ávís mongd av áliti; men tað er dirvi, sum setur álitið í gongd.

Lovaða Landið hevur trupulleikar í risastødd, og tú skalt líta inn í eyguni á teimum og vinna á teimum, áðrenn tú fært gingið inn og sett búgv. Tað eru trý ting, sum tú skalt geva tær far um í 5. Mósebók, kapittul 7, har Gud talaði við ísraelsmenn og bað teir ognartaka Lovaða Landið:

1) *Harrin Gud tykkara er við tykkum ... og hann er ein máttmikil Gud.*
2) *Gud tín er størri enn ein og hvør mótstøða, sum tú nakrantíð kanst koma at standa andlit til andlits við.*
3) *Tá ið tit ganga fram í fylking, fer hann at geva tykkum sigur á teimum (vers 22). Gud skal ganga undan tær. Hann fer at gera tað fyri teg, sum tú ikki sjálvur kanst gera; men tú ert noyddur til sjálvur at møta upp til stríðið.*
4) *”... ikki í bræði, men so líðandi ...” (vers 22).*

Annaðhvørt talan er um at leggja undir seg Lovaða Landið ella at vinna á okkara lyndisbrekum, so megna vit tað ikki í einum taki, og tí arbeiðir Gud upp á okkum á einum umráði fyri og øðrum eftir. Lívið er ikki ein stórur bardagi, har vit enda í einari sigursskrúðgongu. Nei, tað eru nógvir smáir dagligir sigrar, sum eru neyðugir fyri at berja teir niður, sum eru fíggindar av tínum andaliga vøkstri. Fýra og tjúgu kapitlar seinni talar Gud framvegis við Ísrael og biður teir vera reystar og hugdjarvar. (5. Mós. 32,6) Tað kemst av tí, at dirvi er sum ilt, súrevni, tí uttan tað kanst tú ikki koma frá tí við lívinum. Dirvi er ikki tað sama sum, at eingin ótti er har. Dirvi er at vinna á óttanum. Dirvi er at fara til verka, meðan tú ert bangin – líka til tú ikki longur ert bangin. Tað merkir, at tú piprast á vegnum yvir til álit

og treysti. Gud lovaði at fara við teimum og ganga undan teimum. Hvørjum er tað, Gud fylgist við og samstarvar við? Hvørjum er tað, hann gongur undan og hjálpir? Teimum djørvu!

”… et Ord til Dagen” *Effie Campbell* umsetti.

"Njót tú lívið við teirri konu, sum tú elskar." Præd. 9,9. Sum hjún biðið við og fyri hvørjum øðrum. 90% av øllum hjúnum gera ikki tað, sjálvt um tað er tað besta, ið tit kunnu gera, tí Jesus segði: "Um tveir (ella tvey) av tykkum eru samsintir á jørðini um at biðja um okkurt, hvør søk tað so man verða, tá skal tað verða teimum givið av faðir mínum, sum er í himlunum." Matt. 18,19.

*e.c.* ums.

# Ger so væl, órógva meg ikki!

Eina náttina klokkan trý varð eg vaktur. Eg var á gistingarhúsi og svav søtt. Lúðrarnir ýldu óhugnaliga, so eg visti, at nú var eldur í onkustaðni, og sløkkibilar vóru á veg hesa myrku náttina. Lúðrarnir ljóðaðu soleiðis, at sløkkibilarnir kundu komið bæði vestanífrá, sunnanífrá og norðanífrá.

”Hatta man vera stórur eldsbruni,” hugsaði eg, “ og hann man vera nærindis..”

Eg hugdi út ígjøgnum vindeygað á sjeyndu hædd og sá teir glógvandi reyðu sløkkibilarnar steðga við gistingarhúsið, har eg búði.. Eg skundaði mær at ringja til portaran.

”Hvar er eldur í?” spurdi eg.

”Niðri á sættu hædd,” svaraði hann, ”men tygum skulu ikki vera bangin.”

Hann var niðri á stovuhæddini, so honum nýttist ikki at vera bangin; men eg var á sjeyndu hædd. Hjá mær vóru bara nøkur sekund oman í høllina. Niðri á sættu hædd gingu sløkkiliðsmenn við lyktum, øksum, sløkkiamboðum og vatnslangum. Onkur hevði roykt eina sigarett í songini, og eldur var komin í seingjarklæðini.

Tá ið eg fór upp aftur á kamarið, gav eg mær far um trý eyðsýnd skelti á teimum trimum hurðunum, sum eg gekk framvið. Á skeltunum stóð við stórum bókstøvum: ”Ger so væl, órógva meg ikki.!“

Tá ið sløkkiliðsmenninir vóru farnir við bilum og øllum sløkkiamboðunum, fór eg aftur í song, men sovnaði ikki. Eg fekk ikki skeltini úr huganum.

”Ger so væl, órógva meg ikki!”

Nú á døgum hava nógvar milliónir menniskju hongt hetta skeltið. Tey siga: ”Eg veit, at okkara tíð er ein álvarsom tíð. Eg veit, at eg eri ikki á rætta vegnum. Eg eri vilstur av hinum beina, smala vegnum, men ger so væl, órógva meg ikki.”

Ella siga tey kanska: ”Eg havi ikki verið í kirkju í fleiri mánaðir. Vit hava ikki bønarhald í okkara húsi. Eg læri ikki børn míni at lesa í Bíbliuni. Men ger so væl, órógva meg ikki.

Ella eg eri so illa sintur og mangan óblíður. Eg eri eitt vánaligt fyridømi í heimi mínum. Eg havi hildið lítið um og enntá brotið Guds boð við vilja. Men eg vil sleppa frá at tosa um hetta.”

Vit eru lík menniskjunum á Nóa døgum. Tey vildu heldur ikki lata Nóa sleppa at órógva seg, tá ið hann prædikaði um flóðina miklu, sum skuldi koma. Vit eru ikki so nógv øðrvísi enn tey, sum búðu í tí gudleysa staðnum Sodoma. Tey vórðu ávarað, at Gud ætlaði sær at oyðileggja staðin, og at tey máttu skunda sær út haðani og finna sær ein nýggjan stað at búgva í og ein nýggjan lívshátt. Men tey vildu ikki verða órógvað.

Okkum dámar onki, tá ið onkur vísir á brek okkara, veikleikar og syndir okkara; men vilja vit vera fyrireikað til dóm yvir livandi og deyðum, so mugu vit taka okkum um reiggj. Og ongin veit, nær hesin tímin kemur. Nú eru stundir at taka skeltið burtur av hjartahurð okkara: ”Ger so væl, órógva okkum ikki!”

*t.* týddi.

---

Menn tosa ferð eftir ferð um at býta Jerusalem, men tað halda vit ikki, at Gud fer at loyva. Jerusalem verður nevndur meir enn 1000 ferðir í Bíbliuni, og vit vita, at ein dag skal tað jarðiska Jerusalem sameinast við tað himmalska Jerusalem, og býurin verður kallaður “staður hins stóra Kongs”. Sálm. 48,3 V.D. Gud hevur tamarhald á øllum.

*e.c.* ums.

*Sunnudagsblaðið*

*ynskir øllum eitt av Harranum signað nýggjár*

*Heilsan blastjórin*

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74